7. partur hjá Andrias í Tarti:

# Bestu árini vóru við Álaker í 1952

## Samrøða

Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**Í hesum partinum greiðir Andrias frá tíðini, hann var við "Álaker". Teir fiskaðu við snøri undi Íslandi, og vóru á sild við gørnum á sumri. Kjartan Mohr og annars øll á Skipasmiðjuni kann Andrias bert bera alt gott**



*Andrias við mynd av "Álaker"*

Síðan var eg nógv ár við "Álaker". Skal fyrst greiða eitt sindur frá hesum skipi, sum tað er greitt frá í 50-ára minnisritinum hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Partafelagið Vágsbotnur hjá Zacharias Heinesen hevði keypt "Isabellu" frá T F Thomsen á Tvøroyri. Teir vóru akkurát komnir norð við skipinum, tá hann brast á við útnyrðingsstormi tann 19. februar. Hon lá tá á redini í Havn. Onnur ketan slitnaði, og hon dreiv út í Nólsoyarfjørð. Teir noyddust so at sleppa hinari ketuni fyri at fáa skipið undan og fáa segl á.

Tað eydnaðist eisini monnunum umborð at fáa motorin í gongd, og nólsoyingar sóu hetta skip koma grøvandi úteftir. Jóhannes á Skúr í Nólsoy, sum var ein av manningini, ætlaði at seta hana á land í Nólsoy. "Isabella" fekk stóran skaða. Kjølurin fór allur undan, og stórt hol var á síðuni. Í fleiri dagar royndu teir at toga hana út aftur, men illa bar til. Tryggingin fekk so fatur á Tummasi Fagranes í Runavík. Hann skipaði fyri at fáa hana í rættkjøl, og teir fingu hana avstað aftur. Tá høvdu teir bøtt hana so mikið, at teir kundu sleipa hana norð á Kollafjørð fyri fyrst.

Í apríl mánaði varð hon tikin upp á Skipasmiðjuna til umvælingar. "Isabella" var av størstu sluppum og óføra gott sjóskip. Skipasmiðjan keypti skipið, áðrenn tað var liðugt at gera aftur og seldi tað í 1943 aftur til p/f Álaker, har Kjartan Mohr var stjóri.

"Isabella" var bygd í 1884, og teir, sum arbeiddu uppá hana undir krígnum, vita at siga, at kjølurin var úr eini serligari eik, sum var nevnd busteik. Hesin viður var so góður, at teir brúktu av tí gamla kjølinum til skøft til høggijørn, tí hesin viður helt so væl.

### Kjartan søkir eftir bestamanni

Men nú hendir tað, at Kjartan Mohr søkir eftir einum bestamanni til "Álaker". Hann man hava frætt, at eg hevði siglt sum bestimaður við rokmanninum Jákup Andreas (Poulsen) í Gøtu. Tað var ein havnarmaður, sum førdi hana. Hann kallaðist Hansmann undir Varða, sonur Sofus undir Varða, og var hann giftur við dóttur Jóan Fredrik í Leynum. Tað gekk illa á Suðurlandinum.

Hetta var síðsta árið, tað var nettokontrakt hjá fiskimonnum, og hevur tað verið í 1952. Nettokontrakt merkir, at manningin luttók í øllum útreiðslum, sum t.d. olju, agn og salt v.m. Vit fingu 150 skippund. Hetta svaraði til 11.500 fiskar. Tann, sum var bestur at fiska, kallaðist Torkil og var úr Havn. Hann hevði konu úr Funningsfirði, dóttir Johan Hansen. Men nettosáttmálin gjørdi tað, at vit fingu ikki eitt oyra í avrokning, tí úteiðslurnar vóru støri enn inntøkurnar.

Eg fiskaði vist 900-1.000 fiskar. Vit landaðu fiskin á Høgabóli. Fiskurin gav kr. 25.000, men útreiðslurnar vóru 27.000.

Tá var minstalønarskipanin komin. Hon gav kr. 500 um mánaðin, og túrurin vardi í tveir mánaðir. Forskotið var kr. 250, og tað fekk konan sendandi.

### Til Grønlands

Nú fara vit til Grønland. Tað gekk gott at fiska, men vit fingu maskinskaða og komu at liggja 14 dagar í Holstensborg. Farið varð út at fiska við báti, men lítið kom burturúr. Meðan vit lógu inni, var kongur har. Eg minnist, at grønlendingar komu inn við tveimum hvalum at vísa gestunum.

Eg haldi, at vit fingu 900 skippund. Vit landaðu eina last í Føroyingahavnini, og so høvdu vit eina last heim. Eg fortjenti kr. 3.200 í Grønlandi, sum var gott. Tí-



*John, skiparin á "Álaker" saman við konuni Hanna.*



*Her er John farin í bátin at skjóta ritu til agn. Hetta er sami bátur, sum fór til havs í einum óløgi saman við lomvigapisuni, sum tað er greitt frá í greinini*